Fylgiskjal 10

LM-070/2020

AKT 25 Høyringssvar frá Tryggingareftirlitinum.

Tryggingareftirlitið

Fíggjarmálaráðið
Postboks 2039
165 Argir
Føroyar

Tórshavn 10. februar 2020
Journalnr.: 20/00040-2

Ummæli av uppskoti til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eftirløn (eftirlønarlógin) (Frítøka fyri uttanlandsinntøku, hækking av bundna inngjaldinum og javnbjóðis kapping millum eftirlønarveitarar)

Tryggingareftirlitið hevur hesar viðmerkingar til uppskot til løgtingslóg um uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eftirløn (eftirlønarlógin) (Frítøka fyri uttanlandsinntøku, hækking av bundna inngjaldinum og javnbjóðis kapping millum eftirlønarveitarar):

Til broyting nr. 5
Broyting nr. 5 í uppskotinum er orðað soleiðis:

"5. § 7, stk. 4 verður orðað soleiðis:
"Stk. 4. Eftirlønarsamansparingar í peningastovni, ið verða stovnaðar sbrt. hesi løgtingslóg, skulu verða samansettar soleiðis, at fíggjarligi váðin alla tíðina er hóskandi og gagnligur fyri samanspararan. Tá mett verður, um váðin er hóskandi, skal fyrilit havast fyri aldri, heilsu, fíggjarstøðu og øðrum viðkomandi viðurskiftum."

Í almennu viðmerkingunum verður í pkt. **1.2. Galdandi lóggáva** upplýst:

"3. Tryggja javnbjóðis kapping millum eftirlønarveitarar
Eftirlønarlógin hevur ásetingar um, hvussu uppsparing til eftirløn skal støðlast fíggjarliga. Krøvini til eftirlønargrunnar og tryggingarfeløg eru einans yvirskipað, har víst verður til at halda galdandi lóggávu, og at vísa fyrilit fyri umstøðum samanspararans.

Men hinvegin eru viðvíkjandi peningastovnum ítøkilig krøv um, hvussu uppsparingin skal verða samansett í mun til aldur eigarans. Ásetingin í § 7, stk. 4 er soljóðandi:

> *Stk. 4.* Eftirlønarsamansparari í peningastovni kann einans hava íløgur í børsskrásett virðisbrøv har partabrævaparturin fylgir talvuni niðanfyri.
>
> | Aldur í ár | Partabrævapartur í mesta lagi |
> |---|---|
> | - 34 | 80 prosent |
> | 35 - 44 | 70 prosent |
> | 45 - 49 | 60 prosent |
> | 50 - 59 | 50 prosent |
> | 60 - 64 | 40 prosent |
> | 65 - 69 | 30 prosent |
> | 70 - | 15 prosent |

Felagið Peningastovnar hevur víst á, at ásetingin minkar munandi um avkastið hjá teirra kundum, og at hetta ger teirra kappingarstøðu verri í mun til aðrar veitarar, tí tey, ið ynskja

sær eitt hægri váðastøðið frávelja peningastovnarnar.

Eisini kann leggjast aftrat, at Eftirlønarlógin neyvan er tann rætta til at lóggeva um, hvussu ein pensjónsuppsparing ítøkiliga skal verða samansett. Hetta eigur at verða gjørt í teimum lógum og kunngerðum, ið regulera peningastovns- og tryggingarøkið (lov om finansiel virksomhed, Tryggingarlógin o.s.fr.).

Serligu viðmerkingarnar til § 1, nr. 5 er orðað soleiðis:

"Til § 1, nr. 5.
§ 7, stk. 4 verður orða av nýggjum. Talvan við áseting um, hvussu samansetingin skal verða millum virðisbrøv og partabrøv verður tikin burtur. Í staðin kemur sama áseting, sum longu er galdandi fyri eftirlønargrunnar og lívstryggingarfeløg (sí § 8, stk. 2)."

Serligu viðmerkingarnar til § 7, stk. 4 í galdandi eftirlønarlóg eru orðaðar soleiðis, sbr. lm. nr. 121/2012:

"Til stk. 4.
Ásett verður, hvussu nógv kann setast í børsskrásett partabrøv alt eftir aldri hjá eftirlønarsamansparara. Partabrøv geva vanliga betri avkast enn lánsbrøv yvir eitt longri áramál. Eftirlønarsamansparing er ein sera long langtíðar íløga. Tað eru tí góðar fakligar grundgevingar fyri at loyva ungum eftirlønarsamanspararum í stóran mun at gera partabrævalløgur. Hinvegin eru partabrøv ein munandi ótryggari íløga enn lánsbrøv. Tað er tí neyðugt at verja seg ímóti, at samanspararar missa stórar partar av eftirlønarsamansparingini, stutt áðrenn teir gerast pensjónistar. Partabrævaparturin má tí minka so hvørt, sum samanspararin kemur nærri eftirlønaraldri. Íløgureglurnar eru tí gjørdar soleiðis, at partabrævaparturin støðugt minkar gjøgnum alt inngjalds- og íløgutíðarskeiðið, soleiðis at tá persónurin nærkast eftirlønaraldri, eru einans 30% av partabrøvunum eftir í virðisbrævagoymsluni. Í øllum útgjaldingartíðarskeiðnum av eftirlønarsamansparingini er loyvt at hava 15 prosent í virðisbrøvum av eftirlønarupphæddini."

Viðmerkingar
Í seinasta broti í almennu viðmerkingunum sæst, at *Eftirlønarlógin neyvan er tann rætta til at lóggeva um, hvussu ein pensjónsuppsparing ítøkiliga skal verða samansett. Hetta eigur at verða gjørt í teimum lógum og kunngerðum, ið regulera peningastovns- og tryggingarøkið (lov om finansiel virksomhed,* Tryggingarlógin o.s.fr.).

Hóast broytingin í § 7, stk. 4 er víðfevnd, farið verður frá skipan við íløgumørkum til skipan uttan íløgumørk, eru nærum ongar viðmerkingar til innihaldið í broytingini, einans í mun til orsøkina til broytingina, sum er upplýst at vera av kappingarligum slagi.

Verður samanborið við galdandi § 7, stk. 4 er í viðmerkingunum grundgivið fyri innihaldinum í ásetingini.

Tað verður mett alneyðugt at gera innihaldsligar viðmerkingar til hesa broyting, soleiðis at tað ber til at síggja, hvat broytingin nærri fevnir um, og hvørjar avleiðingarnar eru av broytingini.

Seinast í almennu viðmerkingunum í pkt. **1.1. Orsakir til uppskotið** verður mælt til *somu treytir fyri peningastovnar sum fyri aðrar eftirlønarveitarar.*

Tryggingareftirlitið hevur eftirlit við tryggingarfeløgum og tvørgangandi eftirlønargrunnum og hevur eftirlit við, at tryggingarlógin og tær reglur, ið eru ásettar við heimild í lógini, verða hildnar.

Tryggingareftirlitið hevur ikki eftirlit við peningastovnsøkinum, ið er regulerað í *Anordningsbekendtgørelse nr. 1032 af 8. oktober 2019 - Bekendtgørelse af anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om finansiel virksomhed,* og hevur Finanstilsynet eftirlit við við hesum reglum á føroyska peningastovnsøkinum.

Mælt verður til, at Fíggjarmálaráðið lýsir nærri, hvør innihaldsliga broytingin er í § 7, stk. 4, undir hesum, um talan er um somu reglur, sum eru galdandi í Danmark, og um uppsparingin sambært eftirlønarlógini er fevnd av reglunum í *Bekendtgørelse for Færøerne om puljepension og andre skattebegunstigede opsparingsformer m.v.* ella øðrum líknandi reglum. Skuldi tað verið so, at uppsparingin ikki er fevnd av reglunum í kongligu fyriskipanini, ella reglum givnar við heimild í hesi fyriskipan, verður mælt til, at Fíggjarmálaráðið lýsir, hvør hevur eftirlit við, at reglurnar í eftirlønarlógini á peningastovnsøkinum um iløgurøkt verða hildnar.

Vinarliga

Jógvan Thomsen

Stjóri

/Katrina Maria Johannesen